UTTAN ÚR HEIMI

## Ákærdur fyri gomul morð

Ákæruvaldið í Finnlandi hevur ákært ein 63 ára gamlan mann fyri at hava beint fyri einum ungum manni og tveimum gentum fyri 45 árum síðani. Sjálvur sigur maðurin, at hann minnist ikki, hvat hendi tað kvøldið í 1960.

Tvær 15 ára gamlar gentur og ein 18 ára gamal drongur vórðu funnin deyð í einum tjaldi tætt við eitt vatn. Tey vóru stungin við knívi. Ein annar 18 ára gamal drongur, Nils Gustafsson, lá vitleysur í tjaldinum. Hann var eisini stungin fleiri ferðir og hevði brotið kjálkabeinið. Nú vil ákæruvaldið vera við, at tað var hann, sum myrdi hini trý.

Eftir finskari lóg kann eitt drápsmál takast uppaftur, sama hvussu gamalt tað er, og ákæruvaldið hevur gjørt av at taka tað 45 ára gamla málið framaftur, eftir at bretskir serfrøðingar kannaðu gomlu skógvar hansara fyrr í ár. Verður hann funnin sekur, kann hann fáa lívlanga fongsulsrevsing.

Nils Gustafsson og verjar hansara halda uppá, at hann er ósekur. Verjarnir siga, at tað er nógv í málinum, sum vísir, at Nils Gustafsson kann ikki hava beint fyri hinum trimum. Men ákæruvaldið hevur gjørt av at royna málið í rættinum.

## Krevja bíligt bensin

Tað er yvirhøvur vorðið dýrari at liva í teimum suðurevropeisku londunum, síðani evran bleiv felags gjaldoyra, og nú kæra fólk seg um, at bensinið er vorðið alt ov dýrt.

Serliga í Fraklandi og Italia eru fólk misnøgd við tann høga bensinprísin, og fyrradagin lovaði franski forsætisráðharrin, Dominique de Villepin, at fólk, sum hava trupulleikar av tí dýra bensininum, skulu fáa hjálp frá tí almenna. Fronsku bileigararnir hava boðað frá, at teir ætla sær at steingja fleiri av teimum týðandi vegunum, gera politikararnir ikki okkurt fyri at fáa bensinprísin niður.

Tað er ikki bara tann høgi oljuprísurin á heimsmarknaðinum, sum ger, at bensinið er so dýrt í Fraklandi. Síðani 2001 hevur franska stjórnin lagt avgjald á bensin og dieselolju, og í dag eru avgjøldini ávikavist 74 og 67 prosent. Tað er alt ov nógv, nú oljan er vorðin so dýr, siga teir flestu politikararnir, sum tí vilja hava stjórnina at broyta skipanina, so avgjaldið lagar seg eftir oljuprísinum á heimsmarknaðinum. Var tann skipanin galdandi nú, hevði avgjaldið verið lítið, tí oljan er so dýr.

## Smíða bíligar stuttleikabátar

Norsku vinnulívsmenninir Jens Ulltveit-Moe og Morits Skaugen halda seg hava funnið eini hyggjuráð. Teir eru farnir undir at smíða stuttleikabátar á einari bátasmiðju í Kina, og tann lága lønin har ger, at bátarnir eru bíligir samanborið við tilsvarandi bátar, sum verða smíðaðir á okkara leiðum.

Teir báðir hava drúgvar royndir í Kina. Morits Skaugen er stjóri í einum reiðaríi, sum siglir við gassi í Kina, og Jens Ulltveit-Moe eigur eina bátasmiðju í Kina, sum ger bjargingarbátar. Teir hava stovnað fyritøkuna FiveStar Marine, og tað er hon, sum smíðar stuttleikabátarnar.

Tann fyrsti báturin er farin av bakkastokki og kemur til Noregs í næsta mánað. Hann er 28 føtur langur og útgjørdur við øllum nútímans hentleikum. Ætlanin er at smíða umleið 40 bátar um árið, og roknað verður við, at prísurin fer at liggja væl niðan fyri eina millión norskar krónur. Tilsvarandi bátar, sum verða smíðaðir í Noregi, kosta ímillum 1,3 og 1,4 millión norskar krónur, skrivar Aftenposten.

# Flutt burtur við makt

**Ísraelski herurin gjørdi í gjár álvara av hóttanini at flyta tey seinastu niðursetufólkini úr Gaza við makt**

GAZA

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*



*Hesin vildi ikki fara við góðum, so hann bleiv fluttir burtur við makt*

-Vit fara ikki hiðani. Guð hevur givið okkum hetta landið, og vit vita, at hann fer at fremja eitt undur, so vit verða verandi her.

Tey mest víðgongdu niðursetufólkini hildu til tað seinasta, at Guð mundi fara at senda teimum hjálp, so tey sluppu at verða verandi í Gaza, men hjálpin kom ikki. Ístaðin fyri gingu ísraelskir hermenn hús úr húsi og bóðu húsfólkini fara um markið til Ísraels sum skjótast.

Í bygdunum Moarg og Kerem Atzmona settu ill niðursetufólk bingjur við burturkasti og viðabular á vegirnar fyri at steðga teimum ísraelsku hernaðarakførunum, men hermenninir ruddaðu vegirnar. Aðrastaðni savnaðust niðursetufólk í synagogum, men heldur ikki har fingu tey frið, tí hermenninir fóru inn í synagogurnar eftir teimum.

Summastaðni fóru niðursetufólk og hermenn til hendurs, og tað endaði við, at nógv niðursetufólk vórðu tikin. Harumframt eru umleið 800 mótmælisfólk tikin. Hetta eru fólk frá ísraelska høgravonginum, sum vóru komin til Gaza at forða herinum at flyta niðursetufólkini burtur.

Útlendskir eygleiðarar í Ísrael siga, at burturflytingin úr Gaza hevur nógv støri áhuga uttanlands enn í sjálvum Ísrael. Eitt danskt sjónvarpslið var fyrradagin í Tel Aviv og spurdi fólk, hvat tey hildu um burturflytingina, men tey flestu svaraðu, at tey hugsaðu als ikki um tað.

# Alt ruggar ikki rætt við kýprisku flogvanlukkuni

**Altjóða flogferðsluserfrøðingar seta fleiri spurnartekin við, hvat veruliga hendi, tá tað kýpriska ferðamannaflogfarið datt niður í Grikkalandi**

FLOGVANLUKKA

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Flogskipararnir á teimum báðum griksku jagaraflogførunum, sum vórðu send at vita, hvat bagdi tí kýpriska ferðamannaflogfarinum, sóu einki hol á skrokkinum og heldur ongan brotnan rút.

-Ein brotin rútur ella eitt hol á skrokkinum skuldi verið tann mest sannlíka orsøkin til, at trýstið inni í flogfarinum var fallið, sigur amerikanarin Bill Waldock við tíðindastovuna AP. Hann er professari í flogferðslutrygd.

Tað kýpriska flogfarið var í 34.000 fóta hædd. Tað er rættiliga kalt so høgt uppi í luftini, men kortini kundu flogskipararnir á teimum báðum jagaraflogførunum síggja ymiskt, sum hevur áhuga í sambandi við vanlukkuna. Eitt nú sóu teir, at flogskiparin var ikki í stýrihúsinum, at stýrimaðurin sá út til at hava mist vitið, at tvey onnur fólk royndu at sleppa fram at róðrinum, og at iltmaskurnar hjá ferðafólkunum vóru dotnar niður undan loftinum, soleiðis sum tær eiga at gera, tá trýstið inni í flogfarinum fellur. Við øðrum orðum hevði frostið ikki lagt seg á vindeyguni í flogfarinum, sum annars hevði verið tað sannlíka undir slíkum umstøðum.

Tá trýstið inni í einum flogfari fellur brádliga, boðar trygdarskipanin alt fyri eitt flogskiparunum frá tí. Teir vita, at teir skulu fáa sær iltmaskurnar fyri andlitið beinanvegin, og at flogfarið skal fara niður í 12.000 fóta hædd, tí har er nóg mikið av ilt.

Paul Csysz, sum er professari í verkfrøði, sigur við AP, at hann ivast í, at tað var trýstfall inni í flogfarinum, sum var orsøkin til vanlukkuna. Hann vísir á, at flogskipararnir hava atgongd til meiri ilt enn ferðafólkini, og at teir hava nóg mikið av ilt til einar 15 minuttir. Harafturat vísir hann á, at sambært flogskiparunum á jagaraflogførunum vóru tvey onnur fólk í stýrihúsinum, samstundis sum stýrimaðurin sá út til at hava mist vitið.

-Stýrimaðurin hevur neyvan mist vitið av trýstfalli í 34.000 fóta hædd, sigur Paul Csysz.

Aðrir serfrøðingar siga, at tað er sera sjáldsamt, at eitt flogfar av hesum slagnum fær trupulleikar við trýstfalli. Neyðskipanin sigur flogskiparunum frá, so teir kunnu taka flogfarið longri niður, og hini av manningini vita eisini, hvat tey skulu gera í einum slíkum føri, siga teir.

-Hetta er ein løgin vanlukka, sigur formaðurin í altjóða flogskiparafelagnum, Terry McVenes, við BBC.

John Navne, flogferðsluserfrøðingur, heldur, at manningin á tí kýpriska flogfarinum hevur havt onkran annan trupulleika at hugsa um, og at tey tí hava gloymt at fáa sær iltmaskurnar fyri andlitið. Hann vísir á, at flogskipararnir kærdu seg um, at hitaskipanin í flogfarinum virkaði ikki, sum hon skuldi, stutt eftir at flogfarið var farið úr Kýpros. Kanska hava teir roynt at loysa tann trupulleikan, men hava ikki verið førir fyri at hugsa seg nóg væl um, tá illtrot fór at gera vart við seg.

-Teir hava tí ikki varnast, at nakar vandi var á ferð, sigur John Navne við BBC.